


## .Net-menningarfólk

- ☑ Dámar tær at hava ábyrgd og at arbeiða sjálvstøðugt?
- ☑ Hevur tú áræði og hug at læra meira?
- ☑ Dugir tú at menna og læra frá tær?
- ☑ Dámar tær eins væl arkitektur og teknik?
- ☑ Kennir tú væl .NET ?
- ☑ Hevur tú royndir við C#, Visual Basic ella Java?
- ☑ Og royndir við menning av WEB-skipanum?
- ☑ Hevur tú holla útbúgving innan kunningartøkni?

Svarar tú ja til nakrar av hesum spurningum, ert tú møguliga tann, vit hava brúk fyri á Elektron!

Tú skalt arbeiða í ymiskum verkætlanum og luttaka í okkara .Net-menningarbólki. Bólkurin hevur m.a. ábyrgd av menningartólunum, menningarumhvørvinum, arkitekturi og standardum.

Umhvørvið er heterogent, og vit eru í holt við at byggja nýmótans loysnir - ið byggja á SOA-arkitektur, har .NET er ein av okkara strategisku platformum. Arbeiðsumhvørvið er líkatil, innovativt, hjálpsamt, krevjandi og við hvørt rokaligt. Kortini er pláss fyri persónligari og fakligari menning.

Fleiri upplýsingar:
Ring til Robert Vilhelmsen á telefon 345100 ella 545108 og fáa meira at vita um tínar møguleikar á Elektron.

Send skrivliga umsókn til P/F Elektron ella við telduposti til ulla@elektron.fo, innan 18. apríl.

Vit gleða okkum at frætta frá tær!

**Elektron**

Staravegur 9 · P.O. BOX 3219
FO-110 Tórshavn
Tel.: +298 34 51 00 · fax: +298 34 51 01
e-mail: info@elektron.fo

*Stephanssons Hús*



Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi, ið bera brek. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast í løtuni uml. 100 fólk, og játtanin fyri 2006 er uml. kr. 17 mió.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

# Stuðulsráðgevarar til Stuðulsfólkaskipanina fyri børn á Almannastovuni

Til ráðgevaratoymið hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri børn verður søkt eftir tveimum eldsálum, einum fysioterapeuti og einum sjúkrarøktarfrøðingi, helst við viðkomandi eftirútbúgving og/ella royndum innan arbeiðið við børnum, ið bera brek, og familjum teirra. Fólk við øðrum heilsufrøðiligum útbúgvingum eru tó eisini vælkomin at søkja.

Ráðgevararnir koma at vera við í einum tvørfakligum toymi, sum verður við at byggja nýggju Stuðulsfólkaskipanina upp frá byrjan. Ráðgevaratoymið í Stuðulsfólkaskipanini virkar í tøttum samstarvi við ráðgevaratoymið á Brekdeildini og við økisdeildirnar hjá Almannastovuni um at skipa heildarloysnir fyri børn, ið bera brek, og familjur teirra.

Ráðgevararnir koma eisini at:
- ráðgeva stuðlum og leggja teimum lag á
- verða við til at orða og eftirmeta samstarvsavtalur um stuðulsuppgávur
- leggja til rættis og standa fyri førleikamenning av stuðlum

Vit sóknast eftir sjálvstøðugum fólki, sum megna at ganga undan og vísa nýggjar leiðir til betri stuðulsloysnir. Ráðgevararnir mugu verða virknir, samstarvshugaðir og fyrikomandi. Ráðgevararnir mugu duga at orða seg í skrift og talu og hava telduførleika á brúkarastøði.

Ráðgevararnir koma at ferðast nógv kring landið. Stórur partur av arbeiðinum fer eftir ætlan fram á Stuðulsstovunum kring landið, har tann fyrsta letur upp í Tórshavn í næstum, og á økisdeildunum hjá Almannastovuni. Ráðgeving og vegleiðing heima hjá børnunum verður somuleiðis partur av arbeiðinum.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Oyvind av Skarði, deildarleiðara, á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 19. apríl 2006.

Send umsóknina til:
Stuðulsfólkaskipanin fyri børn
Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 4780 80